# Landið betala útreiðslur hjá undirsjóvar-tunlunum



**-Undirsjóvartunlarnir skulu javntsetast við tunlarnar á landi og tí skal landskassin yvirtaka útreiðslur hjá undirsjóvar-tunlunum, heldur meirilutin í fíggjar-nevndini**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landið eigur at yvirtaka ein part av útreiðslunum hjá teimum báðum undirsjóvartunlunum í Føroyum.

Tað heldur meirilutin í fíggjarnevndini, sum eru samgonguflokkarnir.

Fíggjarnevndin er liðug at viðgera fíggjarlógina fyri næsta ár og nú skal so Løgtingið taka endaliga støðu.

Tann viðgerðin byrjar í morgin árini, men enn ber ikki til at siga, hvussu drúgv, viðgerðin verður.

**Flyta útreiðslur**

Ein niðurstøða, sum meirilutin í fíggjarnevndini er komin til, at Landskassin eigur at átaka sær tað, sum tað kostar at reka teir báðar undirsjóvartunlarnar.

Og meirilutin heldur eisini, at landsstýrismaðurin í vinnumálum eigur at syrgja fyri, at hesar útreiðslur verða fluttar frá undirsjóvartunlunum, yvir í landskassan.

Vágatunnilin kostar 2,6 milliónir í rakstri um árið og Vágatunnilin kostar 3,1 milliónir í rakstri. Sostatt kosta báðir undirsjóvartunlarnir 5,7 milliónir í rakstri um ári.

Her er talan um allan vanligan rakstur, umframt streymnýtsluna hjá tunlunum.

Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini sigur, at hetta eigur at verða gjørt fyri at javntseta undirsjóvartunlarnar við allar hinar tunlarnar í landinum.

- Sum støðan er nú, hava tunnilsfeløgini ábyrgdina av rakstrinum, eisini av vegunum til og frá tunlunum.

- Tað merkir, at tað eru tey, sum koyra ígjøgnum tunlarnar, sum betala hendan kostnaðin.

Hinvegin betalir landskassin alt, sum tað kostar at reka allar hinar tunlarnar í landinum og tann streymin, sum tunlarnir brúka.

Tí halda vit at tað er rætt, at allir tunlar verða javntsettir, so at tað almenna betalir tað, sum tað kostar at reka allar tunlarnar.

Anfinn Kallsberg vísir eisini á, at tá ið tunlarnir eru betaltir, fella teir til landskassan, sum tá átekur sær allan rakstrarkostnaðin.

Harafturat arbeiðir samgongan við ætlanum um undirsjóvartunlar til Sandoyar og Suðuroyar. Men teir fara neyvan at gjalda nevnivert, hvørki til rakstur ella til rentur og avdrátt og tí kemur tað mesta av hesum útreiðslum at liggja í landskassanum.

- Tað, sum vit gera nú, er partvíst at taka hetta upp á forskot, leggur hann afturat.

Anfinn Kallsberg sigur, at her er talan um so lítlar upphæddir, at tað fer neyvan at ávirka prísin at koyra ígjøgnum tunlarnar.

# Skulu fara undir tunnil til Sandoy beinanvegin

**Arbeiðið at gera undirsjóvartunnil í Sandoy skal byrja beinanvegin næsta ár, heldur minnilutin í fíggjarnevndini. Teir vilja hava Løgtingið at seta 30 milliónir av til endamálið**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Arbeiðið at gera undirsjóvartunnil í Sandoynna, skal byrja beinanvegin.

Tað heldur minnilutin í fíggjarnevndini hjá fíggjarnevndini.

Páll á Reynatúgvu úr Tjóðveldisflokkinum, sigur, at minnilutin í fíggjarnevndini hevur mælt til at gera fleiri íløgur, sumv fara at gera samfelagið bíligari í longdini.

Ein av hesum íløgunum er undirsjóvartunnilin í Sandoynna.

Tí mæla Páll á Reynatúgvu, Kári P. Højgaard og Karsten Hansen til, at Løgtingið longu næsta ár setir 30 milliónir av til tunnilin.

Harafturat eigur landsstýrið at leggja verklagslóg fyri Løgtingið longu áðrenn 1. mars.

Tað vildi verið eitt samferðsluligt nýbrot av teimum heilt stóru, tí tað hevði bundið tey veikastu økini, Sandoy, Skúvoy og Suðuroy, tættari at miðstaðarøkinum.

Samstundis mælir minnilutin til, at sjey milliónir verða settar av til tunnils til Dals.

Men skotið verður eisini upp, at tað skal verða ókeypis at ferðast við Strandferðsluni.

Haraftirat vil minnilutin seta 7,5 milliónir av til eftirskúla í Hvalba, umframt at sjey milliónir verða settar til havnagerð í Skúvoy og í Svínoy.

- Yvirhøvur hava vit eisini lagt dent á at styrkja útjaðaran, sigur Páll á Reynatúgvu.

Men umframt hetta, mæla vit eisini til at fylgja PISA tilmælinum og vilja tí hava fimm milliónir afturat til fólkaskúlan og tær skulu brúkast til 1.-3. flokk. Vit mæla eisini til at sera Kyotu sáttmálan í verk og at styrkja tjóðpallin.

- Vit mæla eisini til at strika skattalættan, men at lækka donsku ríkiveitingina at kalla tilsvarandi, leggur Páll á Reynatúgvu afturat.

Tilsamans gevur fíggjarlógin hjá minnilutanum milliónir í avlopi, men tá er ikki roknað við ymsum serinntøkum, eitt nú inntøkum frá einskiljingum.

Meirilutin í fíggjarnevndini hevur roknað við 74 milliónum í avlopi, umframt serinntøkunum.

# Undirsjóvartunlar til Sandoy og Suðuroy komnir eitt stig nærri

**Verða útreiðslurnar til Smyril og Teistan umroknaðir til pengar yvir 20 ár, kunnu tær betala eina íløgu upp á 2,5 milliardir. Tí er spurningurin um vit hava ráð at lata vera við at gera undirsjóvartunlarnar, sigur Anfinn Kallsberg**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ætlanin at gera undirsjóvartunlar til Sandoyar og Suðuroyar, koma alsamt eitt stig nærri.

Og nú Løgtingið fer at viðgerða fíggjarlógina fyri næsta ár, kann staðfestast, at nú er aftur eitt stig tikið fram ímóti føstum sambandi til Sandoyar- og serliga til Suðuroyar.

Tað hevur leingi ligið í kortunum, at farið verður undir tunnil til Sands í allarnæstu framtíð, helst í 2008.

Men nú heldur meirilutin í fíggjarnevndini, at landsstýrið eigur at fara undir eina samlaða verkætlan fyri ferðasambandið til Sandoyar, Hest, Suðuroy og Skúvoy.

Men her heldur meirilutin, sum er samgonguflokkarnir, at landsstýrið eigur at hugsað um eina alternativa fíggingar, har serliga rakstrarkostnaðurin til Strandferðsluna verður kapitaliseraður, tvs, umroknaður til pengavirði.

Tí verður mælt til, at landsstýrið ger eitt útgreiningararbeiði fyri at meta um eina alternativa farleið til Sandoyar og Suðuroyar

**Kunnu fíggja 2,5 milliardir**

Víst verður á, at næsta ár er ætlanin at sigla fleiri túrar við Smyrli og tilsamans verða útreiðslurnar til siglingina hjá Strandferðsluna til Sandoyar, Skúvoyar og Suðuroyar, 88,1 milliónir.

- Sleppa vit undan hesi útreiðsluni og gera hana til eina íløgu í undirsjóvartunlar ístaðin, klárar tað at forrenta eina íløgu upp á 2,5 milliardir, tey næstu 20 árini, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann sigur, at fyri hesa upphæddina ber til at gera fast samband til tær syðru oyggjarnar.

- Vit kunnu eisini ímynda okkum, at um 20 ár skulu vit hava ein nýggjan Smyril.

Anfinn Kallsberg sigur, at tað kostar einar 55.000 krónur fyri kilometurin at gera ein undirsjóvartunnil.

- Sostatt ber til at gera undirsjóvartunnil úr Sandoy til Suðuroy fyri eina góða milliard og hetta er ikki stórt meiri enn raksturin av Smyrli í góð 10 ár. Tó at eitt sindur kemur innaftur í inntøkum.

- Tí er tað ein spurningur, um vit hava ráð at lata vera at gera undirsjóvartunlarnar til Suðurøkið í Føroyum, sigur formaðurin í Fíggjarnevndini.

Hann vísir eisini á, at har undirsjóvartunlar eru gjørdir, varð talan um rutur hjá Strandferðsluni, sum góvu avlop.

So mikið størri verður vinningurin, tá ið vit hugsa um, at til Sandoy, Skúvoyar, og serliga til Suðuroyar, er talan um rutur, ið geva stórt hall og sum landskassin longu nú brúkar slakar 90 milliónir til, hvørt einasta ár, hóast nakað kortini kemur innaftur í ferðaseðlum.

Hann staðfestir, at tølini eru eitt sindur leyðsliga mett.

Men hann heldur, at perspektivini eru løtt at fáa eyga á og tað er hendan bóltin, vit spæla út nú, og í hesum visjónstíðum sakar tað onki at lufta tankan, leggur hann afturat.

Hann sigur eisini, at hetta er eitt mál, sum er ikki sørt umrøtt í samgonguni.

Annars mælir minnilutin til, at arbeitt verður fram ímóti a bjóða Sandoyartunnilin út í 2008.